Kommunufelagið

Heilsu- og innlendismálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Dagfesting
17. apríl 2018

Okkara j.nr.
18/00686-2

Málsviðgeri
Eyðun Christiansen

Tygara j.nr.

**Viðv. : Eftirmeting av faldara um endurvenjing innan sjúkrahúsverk, almannaverk og kommunur**

Heilsu- og innlendismálaráðið hevur í skrivi dagfest 9. februar 2018 boðað frá, at ráðið ætlar sær at fara undir eina eftirmeting av endurvenjingarøkinum. Eftirmetast skal her í millum, hvussu kunngerðin og ein vegleiðandi faldari, ið varð gjørdur, roynast í verki, og hvussu tað gongur við at fylgja forskriftunum í omanfyri nevndu kunngerð og faldara.

Kommunufelagið hevur spurt seg fyri hjá kommunalu samstørvinum og Tórshavnar kommunu, hereftir kommununar, hvussu tey meta støðuna vera á endurvenjingarøkinum.

Kommunurnar hava sum heild ikki trupulleikar við at veita tær tænastur og liva upp til tær skyldur, sum tær sambært lógini og nevnda faldara hava. Kommunurnar veita heimabúgvandi fólkapensjónistum, t.v.s. borgarum eldri enn 67 ár, tænastur, ið kunnu stimbra likamliga, sálarliga og sosialt, soleiðis at pensjónisturin kann búgva í egnum heimi sum longst. Talan er um ergoterapi, fysioterapi, endurvenjing, fyribyrgjandi venjing, viðlíkahaldsvenjing v.m.

Onkur kommuna vísir tó á, at venjingarumstøðurnar ikki hava verið nøktandi, og tað til tíðir hevur verið trupult at útvega teimum heimabúgvandi nøktandi venjingarmøguleikar, men arbeitt verður við hesi avbjóðing.

**Viðurskifti hjá Almannaverkinum og sjúkrahúsinum sæð frá kommunalari síðu:**
Ein trupulleiki er, at *borgarar undir 67 ár*, ið hava tørv á viðlíkahaldsvenjing/víðari venjing eftir at viðgerð á sjúkrahúsi er liðug, ikki fáa neyðuga venjing. Kommunurnar uppliva javnan, at borgarar – og í summum førum eisini sjúkrahúsverkið – seta seg í samband við tær. Kommunurnar vísa tá borgarunum og sjúkrahúsverki víðari til almannaverkið.

Framhaldandi vísir tað seg tó ofta, at hesir borgarar ikki fáa neyðugu venjingina, tí venjingin hjá almannaverkinum sambært faldaranum er *tíðaravmarkað* (til ávikavist 3 og 6 mánaðir). Harumframt fevnir endurvenjingin bert um borgarar í arbeiðsførum aldri, ið hava verið fyri tilburði, sum hevur broytt førleikastøði og lívsumstøður teirra munandi.

Tey, sum kunnu fáa endurvenjing á endurvenjingarstovunum hjá Almannaverkinum, koma úr einum av hesum báðum bólkum:

a) Borgarar, sum hava trupulleikar við at fáa ella fasthalda sítt tilknýti til arbeiðsmarknaðin.

Kommunufelagið

b) Borgarar, sum fáa, ella hava rætt til tilboð frá Trivnaðardeplinum, og verða mettir at kunna venjast til størri sjálvbjargni.

Hetta vísir, at málbólkurin hjá Almannaverkinum innan venjing er avmarkaður, og snýr seg bert um endurvenjing til borgarar við *endurmenningarmøguleikum*.

Borgarar, ið eru undir 67 ár, og sum hava tørv á varandi viðlíkahaldsvenjing t.d. fólk við kroniskum sjúk, detta tí niður ímillum skipanirnar.

Tá ið eldri borgarar verða útskrivaðir av sjúkrahúsinum kemur ov ofta fyri, at borgarin ikki hevur fingið eina nøktandi endurvenjingarætlan.

Hetta er ikki í samsvari við § 7 í Kg. nr. 21 frá 21. mars 2017 um endurvenjing innan sjúkrahúsverkið.

Her er ásett, at:

*§ 7. Sjúklingurin skal í seinasta lagi við útskrivan av sjúkrahúsi, ella tá ið ambulanta sjúkrahúsendurvenjingin er liðug, fáa endurvenjingarætlanina.*

*Stk. 2. Harumframt skal endurvenjingarætlanin, við samtykki frá sjúklinginum, latast avvarðandi kommunu, Almannaverkinum ella øðrum sjúkrahúsi, um endurvenjing skal halda áfram har.*

Dømi eru eisini um útskrivingar, har tann útskrivaði hevur tørv á hjálpartólum og/ella møguligum bústaðarbroytingum, men at hetta ikki er fráboðað frammanundan útskrivingini. Hettar hevur við sær, at útskrivaði borgarin oftani má bíða í 5 til 10 dagar, áðrenn Hjálpartólamiðstøðin hevur avgreitt málið.

Ein trupulleiki tykist eisini vera, at skiftandi læknar ikki kenna røttu mannagongdir í sambandi við útskriving. Yngri borgarar verða til dømis sendir heim av skaðastovunum, og bidnir um at venda sær til terapeutarnar í kommununi ella til privatstarvandi fysioterapeutar fyri at fáa neyðugu venjingina.

Hóast nøkur lýti sostatt eru, sær út til at skipanin virkar betri í dag, enn hon gjørdi fyri einum ári síðani.

Kommunufelagið vil fegin koma á fund at umrøða møguligar broytingar, sum kunnu bøta um skipanina.

Vegna Kommunufelagið

| | |
|---|---|
| Dennis Holm<br>Formaður | Eyðun Christiansen<br>Stjóri |